# TILTØK

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti v/ Sunnudagsskúla. kl. 18.00 Evangel. møti við Bo Wallerberg leiðara av Skandinavisku barnamissiónini og Lyudmilu Lonyuk leiðara av Skandinavisku barnamissiónini í Ukraina. www.gospelfo.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 18.00 Evangel. møti, Tormund Hansen og fleiri vitja við sangi.
Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Vikuskiftis møtirøðin við Jens Peder Pedersen heldur fram í kvøld kl. 20.00.
Leygardagin kl. 20.00 Evangel. møti.
Sunnudagin Morgunmøti v/ breyðbróting kl. 11.00 og seinasta møti við Jens Peder Pedersen verður kl. 18.00. Sí lýsing aðrastaðni í blaðnum. Drekkamuður aftaná. Verið vælkomin til møtini.

**Filadelfia, Miðvágur**
Leygardagion kl. 16.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við Sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Missiónsvika í kirkjuni í Bø**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Jóan Petur Johannesen talar, Ungdómskórið syngur.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Marjan Nielsen talar og Manskórið syngur.
Sunnudagin kl. 12.00 Gudstænasta við Ingu Poulsen Dam, kl. 15.00 Barnamøti við luttøku úr Sørvági. Møti um kvøldið kl. 18.00, Regin Høgnesen talar.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Vegna missiónsviku í Bø verður farið til Bíggjar í sunnudagsskúla kl. 15.00. Bilar koyra frá Missiónshúsinum kl. 14.45.
Tey eldru børnini vera tó í Sørvági kl. 15.00.
Sunnukvøldið verður onki møti í Sørvági.

**Missiónsvika í Hvalvík frá 22.-26. februar**
Fríggjadagin kl. 20.00 Ung av Skála hava møti.
Leygardagin kl. 20.00 Niels Jakku Nielsen. Innsavnan til húsið.
Sunnudagin kl. 15.00 Familjumøti v/ Bjarta Joensen, kl. 18.00 Mogens T. Christensen, innsavnan til Heimamissiónina.

**Saron, Haldórsvík**
Uppbyggingarmøti verður í Avhaldshúsinum í Haldórsvík leygarmorgunin 25. februar kl. 10.00. Luttøka verður við Jens Peder Pedersen, úr Herning. Øll hjartaliga vælkomin. Onki húsmøti mánakvøldið.

**Meinigheitshúsið, Skála**
Sunnukvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti við Birgir Olsen. Aftaná verður drekka. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 19.30.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Mogens tilsted Christensen.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við leiðsluni fyri 40 daga ráðstevnuna. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Berøa, Saltangará**
Fríggjakvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Ungdómsløta.
Sunnudagin kl. 11.30 Breyðbróting og sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.
Mikudagin kl. 19.30 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Blákrossfest í Bønhúsinum í Søldarfirði**
sunnukvøldið kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tabor á Toftum**
Á ungdóms- og blákrossmøtinum leygarkvøldið kl. 20.00 talar kendi norski reiðarin og vinnulívsmaðurin Per Sævik. Øll eru vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti, kl. 11.00 Sunnudagsskúli.

**Karmel, Eiði**
Sunnukvøldið kl. 19.00 Møti við Justinus Poulsen.

**Skandinaviska Barnamissiónin**
Hjartaliga vælkomin til møtini við Bo Wallenberg, leiðara av Skandinavisku Barnamissiónini og Lyudmilu Lonyuk, leiðara av Skandinavisku Barnamissiónini í Ukraina á hesum støðum:
Leygarkvøldið: Tey hoyrast á Lindini frá kl. 19.00.
Sunnudagin: Hebron á Argjum kl. 12.00.
Sunnukvøldið kl. 18.00 í Evangeliihúsinum í Havn, Jannet Olsen syngur.
Mánakvøldið kl. 20.00 í Samljóð í Skopun.
Týskvøldið kl. 20.00 í Kelduni í Skálafirði, Kristel og Jens Lisberg syngja.
Mikukvøldið í Soli Deo Gloria í Klaksvík kl. 20.00.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti, Frants Jensen talar um evnið: «Jeremia«.
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30. Barnakórið venur aftaná. Kl. 18.00 Møti, Christian Joensen talar um evnið »Hvør er Heilagi Andin«.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, Bønarløta kl. 17.30. Kl. 18.00 Møti við Almu Brend. Ungdómsmøti kl. 21.00 við Leivur í Buð. Øll eru vælkomin. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Preben Hansen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti, kórið venur aftaná.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn og kl. 20.00 Kvinnumøti við Tummas og Sólrun Jacobsen.
Sunnudagin kl. 14.0 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við André Matras. Hvønn gerandisdag kl. 6.15 er Morgunbøn.

**Skúlin í Hvannasundi**
Møti verður í skúlanum í Hvannasundi sunnudagin kl. 18.00 við Petru og Hans Jørgin. Øll hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti, Ólavur Jóhannesen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Fríggjadagin kl. 19.00 Bønarløta.
Leygardagin kl. 19.00 hevur ungdómurin hugnakvøld. Nógvar ymiskar sangkreftir luttaka, m.a. Dreingjakórið. Hallmar vitnar um lív sítt. Kakao og bollar verður at fáa.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Føstulávintsmánakvøld kl. 19.00 er føstulávintshugni, har øll kunnu vera við.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin er sunnudagsskúlin avlýstur. Ætlaða barnagudstænastan er útsett til næsta sunnudag kl. 14.00. Kl. 17.30 er Bønarmøti og kl. 18.00 Møti við Noru og Kirstein Stórhamar.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin kl. 19.00 Vikuskiftismøtir í Fylking á Tvøroyri. Kl. 22.00 Flipp á Herstøðini í Vági (ungdómsmøti)
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti v/ Karinu Magnussen. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 20.00 Guitarskúli fyri 12 ár og eldri.
Týsdagin kl. 18.00 Juniorklubbur, kl. 20.00 Streingjakórið øvar.
Mikudagin 1. mars kl. 20.00 Heimaforbundsmøti.

**Bethel, Vágur**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Missiónsvikan byrjar týskvøldið 28. februar við møti har Pól Johannesen, trúboðari talar og heldur fram onskvøldið við Snorra Brend. Øll eru vælkomin.

**Betania, Sumba**
Leygarkvøldið kl. 20.00 Møti v/ Svenning av Lofti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 v/ Niels Hammer og øðrum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Möti hvört sunnukvöld kl. 20.30. Leygarkvöldið 4. mars kl. 20.30 verður hugnakvöld v/ Jákupi R. Hansen, presti. Sunnudagin 5. mars kl. 15.00 verður gudstænasta í Háteigskirkju. Jákup R. Hansen prædikar. Aftaná verður kaffi á Sjómansheiminum.

**Føroyskt møti**
verður í Zions kirkes sognehus leygarkvøldið 25. februar kl. 19.30. Marin Elisabeth úr Århus talar. Øll eru vælkomin.

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 26. februar verður gongutúrur: Mannafalsdalur, Ritufelli og Týggjará. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Túrurin er miðaltungur. Gingið verður uml. góðar 3 tímar, minst til at hava góð og heit gonguklæðir og ein matpakka við. Tilmelding neyðug.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 27. februar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 Enskt á byrjunarstigi 1, Hilda Frýdal
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, kánus o.o. spøl. Høvi er at koma sum gestur til døgurðan miku.- og fríggjadag. Tilm. mánadag á tlf. 316491. ***Tilmelding at ganga ígjøgnum undirsjóvartunnilin til Klaksvíkar, tlf. 316491.***
***Týsdagin 28. februar***
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00 ***Okkara lív sum eldri***. Verkætlan hjá F. Kommunufelag, Eyðun Kristiansen, verkætlanarleiðari og Sveiney Sverrisdóttir, skrivari
***Mikudagin 1. mars***
kl. 10-13.30 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 10.00-12.00 Handverk. Vegleiðing er á staðnum. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00 Túrur (Samstundis venjing til at ganga ígjøgnum undirsjóvartunnilin).
***Hósdagin 2. mars***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 Enskt á byrjunarstigi 2, Àsmundur V. Johannesen
kl. 14-17 Telduprát, vegleiðing á staðnum
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. ***Vit venja til kappingina, ið verður 18. mars á Nabb. Øll eru hjartaliga vælkomin.***
***Fríggjadagin 3. mars***
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 10-12 Máling og tekning. Vegleiðing er á staðnum.
kl. 13.00-17.00 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið á Toftum**
*tlf. 448690*
*er opið frá mánadag-fríggjadag, kl 14.00-18.00.*
*Drekkamunnur v/ smákøkum kostnaður 5 kr.*
*Miku- og hósdag er felags kaffiborð, kostnaður 10,- kr.*
***Mánadagin 20. februar***
kl. 15.00 Opið hús
***Týsdagin 21. februar***
Telduprát. Bólkarnir møta sum avtala. Tilhaldið er opið sum vanligt.
***Mikudagin 22. februar***
kl. 15.00-16.00 er sangur, Martin Restorff Jacobsen spælir klaver. Sangbók Føroya Fólks.
Kl. 16.00 er Filmur: 3. partur av Matador
***Hósdagin 23. februar***
kl. 15.00-17.00 Ættarprát. Tosað verður um staðarnøvn á Toftum
***Fríggjadagin 24. februar***
kl. 15.00-16.00 Myndaútskering, Veving, máling. Annars er hvør vælkomin at hava okkurt annað við sær.

*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið á Toftum.*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
soljan@klaksvik.fo
soljan@post.olivant.fo
***Mánadagin***
kl. 14.00 Fimleikur
kl. 14.00 Tunnusláttur - ***tilm. til týsdagsdøgurðan áðrenn kl. 17.00 á tlf. 459091***
***Týsdagin***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 Bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl. 12.00 Døgurði
***Mikudagin***
kl. 13.30 Telda
***Hósdagin***
kl. 10.00 Fimleikur
kl. 11.00 Telda
kl. 13.30 Bløðini verða lisin fyri sjónveikum. ***Seinasta freist at tekna seg til Bergentúrin 16. mars.***

*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, kánus, o.m.a. Bløðini eru altíð til taks. Hvønn dag enda vit við andakt og sangi.*
**Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið Sóljuna**

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kortspøl og stokkar.
***Mikudag***
Ítriv, silvurarbeiði o.a.
***Hósdag***
Fimleikur
*Allar dagar fáa vit drekkamunn.*

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Mánadagin 27. februar***
Tunnusláttur, kaffi, te og føstulávintsbollar. Vit fara upp á gólv.
***Týsdagin 28. februar***
Myndaskering v/ Hjalmar Olsen
***Mikudagin 1. mars***
Boccia
***Hósdagin 2. mars***
Myndaveving v. Grethu Olsen
***Fríggjadagin 3. mars***
Byrjandi enskt v/ Anette Gaardlykke

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Brúdleyp**
25. mars kl. 13.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum, Annfinn Thomsen, Sumba, búsitandi í Runavík, og Astrid-Maria í Lág, Strendur, búsitandi í Saltangará. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn mánadagin 13. mars á tlf. 448437, 224117, 448342, 258730.

Leygardagin 1. apríl kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Vár í Gong og Johann Behrens, Tórshavn. Veitslan verður í B36-húsinum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 15. mars á tlf. 311531, 212235, 211531 ella á teldupost jib@post.olivant.fo

Leygardagin 1. juli giftast Jacobina Norðberg Petersen og Martin André Assentoft. Vígslan verður kl. 14.00 í Sankt Markus kirkjuni á Frederiksberg. Veitslan verður hildin í veitsluhølinum í Holdkærs Ager nr. 94, Kastrup, kl. 16.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. +45 32513216, +45 31203216 ella á heimasíðuni www.123hjemmeside.dk/binamartin áðrenn 14. apríl.

**60 ár**
11. mars fyllir Ellbjørg Davidsen, Tórshavn, 60 ár. Dagurin verður hildin hjá Eyðgerð og Bjarna, Skákið 1 í Kollafirði frá kl. 10.00-17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 28. februar kunnu hjúnini Annika og Jákup Pauli Egholm í Fuglafirði halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima við morgunmatarborði frá kl. 9.00 til 14.00.